sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri Jan Müller
Fyritøkustjóri Kristjan Dahl
Ljósmyndari Kalmar Lindenskov

Blaðfólk Randi Jacobsen - Dagny Joensen - Justinus Eidesgaard - Sjúrður Skaale - Eyðun Klakkstein

Útgevari, uppseting og prent P/F Sosialurin
Bústaður Argjavegi 26 Argjum

Postadr. Postsmoga 76 110 Tórshavn
Telefon 11820
Telefax 14720

Samráðingar á vegamóti

Oddagrein

UM tvær vikur verður enn eitt samráðingarumfar við bretar um markið. Nú hava verið so mong umfør, at nógv hava gloymt, hvat hesar samráðingar snúgva seg um, og hvussu land ið liggur.

Í stuttum kann sigast, at meðan føroyingar vilja hava miðlinjuna at vera undirgrundar-mark eins væl og fiskimark, halda bretar, at undirgrundarmarkið eigur at liggja longur inni á føroyska landgrunninum enn verandi miðlinja/fiskimark. Teir halda tað heldur ikki vera neyðugt, at fiskimark og undirgrundarmark eru eitt og tað sama. Ósemja er so eisini um, hvussu tú teknar sjálvan miðlinjuna, tá talan er um undirgrundarmark. Her ganga føroyingar og bretar út frá hvør sínum fortreytum.

SAMRÁÐINGARNAR hava í seinastuni snúð seg um, hvussu semja kann fáast um, hvar veruliga miðlinjan er t.v.s. eftir hvørjum skerum og oyggjum, hon skal setast út í kortið. Upprunaliga krav breta varð nógv meira viðgongt, tí teir kravdu eitt mark, sum lá heilt inni móti klettinum. Nú hava teir so "slakað" og spurningurin er so, um føroyingar eru hugaðir at slaka tilsvarandi ella nakað sum helst. Her hava vit so fingið at vitað frá bæði løgmanni og formanni í uttanlandsnevnd, at føroyingar slaka ikki frá miðlinjuni, og tí er málið nú, hvussu henda miðlinja verður teknað.

FORMAÐURIN í føroysku samráðingar-nevndini segði við Sosialin herfyri, at tað má vera greitt longu í hesum ári, um vit vilja gera eina semju við bretar ella vit fara til Haag. Tí er fundurin 6. desember sera spennandi - hann er eitt vegamót. Tað má sjálvandi sigast at vera spell, at vit ikki vita meira um føroysku undirgrundina, tí vitan um olju og gass á okkara leiðum og teimum umstríddu hevði møguliga sett okkum í eina betri betri samráðingarstøðu. Tað kann jú vera at bretar royna at "tvinga" okkum til eina semju, áðrenn vit uppdaga (tað teir helst longu vita) at stór ríkidømi eru í umstríddu økjunum. Ein slík vitan hevði møguliga kunnað gjørt støðuna nógv øðrvísi.

SPURNINGURIN er um ikki vit føroyingar eiga at gera støðu okkara upp nú. Fyrst eiga vit at ganga út frá, at tað finnast stórar oljukeldur í teimum økjum, sum bretar krevja. Hesan vitan hava bretar møguliga, og tí vilja teir ikki boyggja seg. Upprunaliga krav teirra var gjørt so viðgongt fyri at teir kundu hava nakað at slaka upp á og at teir endaðu við at "noyðast" við "bert" at fáa økini beint við miðlinjuna. Spurningurin er um vit nú skulu láta bretar vita, at málið fer til Haag, eru teir ikki rímuligir. Ein stór avgerð, sum nærkast. Undir øllum umstøðum halda vit, at samráðingarfólk okkara hava borið seg rætt at við ikki at láta seg "kúga" av bretum. Nú er at halda fast.

Sosialurin

Lesarabrøv

Undirhald?

Eg vil við hesum gera nakrar viðmerkingar til lesarabrævið í Sosialinum 22. november undir yvirskriftini »Gev fólkinum undirhald«.

Lat meg fyrst siga, at eg eri samdur í skrivinum á onkrum øki. T.d. tá hann átalar niðurgerðingina av BBC World. Eg vildi fegin havt møguleika at sæð BBC World, men nú er tað so, at eg siggi bæði Sky News og CNN, so tørvurin hjá mær eftir fleiri tíðindum er av markaður!

Men lat okkum siga, at eg ikki havi møguleika at siggja annað enn Ras Tórshavn. So vildi eg fyrst og fremst sæð TV3, tí har er stór variation í tilfarinum. Sum næsta ynski vildi eg valt MTV, tí mær dámar væl tónleik, og MTV er fremsta tónleikarásin í heiminum. Nummar 3 og 4 høvdu so ávikavist verið BBC World og Eurosport.

So mítt uppskot til Ras Tórshavn er, at MTV verður sett til aftur, og at BBC World kemur fyri BBC Prime.

Í sínum lesarabrævi mikudagin sigur lesarin eisini, at dømi er um, at fleiri dagar ganga, áðrenn føroysku fjølmiðlarnir »uppdaga« stórtíðindi uttan úr heimi. Her haldi eg, at hann roynir at gloyma TV3 og BBC Prime. Hóast nógva undirhaldið á hesum báðum rásum, so hava tær eisini tíðindi — nýggj tíðindi hvønn dag.

Mín síðsta viðmerking til lesaran, sum skrivaði brævið í mikudags Sosialinum, skal vera um hansara niðurgerðing av næmingum í Hoydølum. Hann sigur, at næmingar í Hoydølum tóku støðu til meira avgerandi samfelagsmál enn undirhald fyrr. Hertil er at siga, at tað jú ikki vóru næmingar í Hoydølum, sum savnaðu inn undirskriftir. Tað var ein 10. flokkur í Venjingarskúlanum, sum kom niðan í Hoydalar at savna undirskriftir! Og tá flestu næmingarnir í Hoydølum hava áhuga fyri tónleiki, so skriva tey sjálvandi undir!

Eg vil enda við at heita á Sosialin, um at skriva hvat hendir í málinum. Tað varð sagt einaferð, at avgerð skuldi fella í seinastu viku!

René A. Niclassen

Viðmerking til Fimmaran

Mær tykir, at javnaðarflokkurin skal seta róðrið meir á sjálvstýrisborð. Vit skulu sjálvi læra at grulva, standa og ganga. Tað hjálpir ikki, at danir hava eftirlit við hesum. Og vit meira enn hálvrokna við, at teir eisini hava ábyrgdina. Men tá ið vit so detta á afturpartin og tá vit so smátt eru byrjað at ganga, fáa vit at vita frá dønum, at hetta er tykkara ábyrgd. Og sjálvandi er tað tað. Tað vóru ikki teir, ið fingu ilt, tá fallið kom.

Vit skulu hava eina sjálvsstýrislóg, har vit sjálvi hava fulla ábyrgd av okkara sjálvstýri, sum gongur líka at loysingini.

Eg tosaði við tveir danir, sum fylgja væl við í politikki landanna millum. Teir søgdu soleiðis: hoyrið nú her føroyingar. Væntiðendiliga ikki og verið ikki so naivir at rokna við, at tit fáa størri hjálp frá Danmark enn tað danir kunnu siga, at hetta er hjálp til sjálvhjálp. Henda hugsan er danska skattgjaldarans, sum er veljarin og gloymið ikki, at sjálvandi er tað danski politikarin, sum má ganga eftir tí. Hetta vóru teirra orð. Og var eg dani, hevði eg nokk eisini hugsað soleiðis.

Danir vilja ikki hava ábyrgdina, tá ið á stendur. Tað hava allar samráðingarnar víst og ikki minst henda seinasta. Í 80-unum høvdu donsk kreditfeløg ov mikið av peningi. Henda pening veittraðu teir til okkara við sum agn. Og peningur er eitt sera gott agn. Samstundis sum teir hava eftirlit við okkara peningaviðurskiftum, hvat man áhugin tá hava verið hjá teimum at ansa eftir, eg sigi teir ikki ringar. Tí eg veit, hvar mín egni eftiransingarhugur tá hevði verið. Langt vekk, sjálvandi. Flest orðini krevja, at ein torir at siga sum er.

Niðurstøðan mín er tann, róðrið meira á sjálvstýrisborð, sum ger, at vit sjálvi vakja yvir okkara peningaviðurskiftum og ikki danir. Til seinasta vænti eg, at taka vit ikki meira ábyrgd av okkum sjálvum, fáa vit bara órðrar til tað.

Eyðun Johannesen.

VALUTAKURSIR

		23.11.95	Ultimo síðsta mán.
USA	Dollari	547,25	547,60
Bretland	Pund	855,45	863,55
Týskland	Markur	387,75	388,14
Svøríki	Króna	83,93	82,39
Noreg	Króna	88,04	87,79
Frakland	Frankur	112,64	111,85
Belgia	Frankur	18,877	18,887
Sveits	Frankur	480,80	480,44
Holland	Gyllin	346,27	346,21
Italia	Liri	0,3447	0,3434
Finnland	Markur	127,97	128,81
Ísland	Króna	9,46	9,47
Eysturríki	Skillingur	55,151	55,192
Spania	Pesetas	4,538	4,484
Portugal	Escudos	3,716	3,688
Kanada	Dollari	404,92	409,72
Grikkaland	Drakmur	2,373	2,386
Japan	Yen	5,4412	5,3732
Írland	Pund	855,13	886,03
	XEU	711,58	712,58

Kelda: Føroya Sparikassi